# Kjak



Sjúrður Skaale

## Tann sexuta krúllan hjá Dan Klein

*Tá eg sat á fólkatingi í 2008, hevði eg lógarkrav uppá eisini at fáa løn frá Løgtinginum. Dan Klein kallar meg "væl betaltan pampara" fyri at hava fingið hesar pengar. Men eg fekk teir aldrin. Eg segði nei takk, tí eg helt tað vera órímiligt at fáa dupulta løn*

Mikudagin 29. desember skrivaði Sosialurin SJÚRÐUR SKULKAR MEST á bæði forsíðu og spísiseðli.

Hetta var síðsta blað fyri nýggjár, so orðini lógu í handlum, á køksborðum og hingu á spísiseðlum kring landið í seks dagar, áðrenn ein onnur yvirskrift fekk teirra pláss.

Tað er helst rætt, at eg síðani ólavsøku ellivu ferðir ikki havi siti í tingsalinum, tá fundur hevur verið. Og alt kemst ikki av tí nógv umrødda marathon-túrinum í New York.

Men eg havi ikki verið burturi, tá mál, ið eg varði av, hava verið á skrá. Eg havi aldrin forsømt mínar uppgávur. Eg havi passað mítt jobb. Tað vita tey, sum fylgja við í politikki.

Eg ivist heldur ikki í, at tey 10 tingfólkini, sum hava forsømt 7, 8, 9 og 10 fundir, hava passað sítt jobb. Tí tað er ikki (ið hvussu er ikki bara) við at sita í tingsalinum, at ein politikari ger tað, sum hann skal. Listin hjá løgtingsskrivstovuni um uppmøting fortelur ikki alla søguna um innsatsin hjá einum løgtingslimi.

Hinvegin hevur Sosialurin sjálvsagt fullan rætt til at brúka henda listan til gera eina fangandi, persónliga og eitt sindur argandi forsíðu. Tað má mann finna seg í. Og eg hevði heldur ikki ætlað mær at svarað uppá tað.

### "Pamparin"

Men tá orðini um tann stóra "skulkaran" verða rópt út um landið í seks dagar, brenna tey seg føst, og fatanin verður, at maðurin er eitt dovið beist.

Onkur, sum hevur serligan áhuga í tí, hevur eisini granskað meira í viðurskiftunum hjá skulkaranum.

Tað førdi hósdagin til eina stórt uppsetta grein í Oyggjatíðindum undir yvirskriftini: "Sjúrður Skaale, løgtingsmaður: Ein væl betaltur pampari".

Dan Klein vísir til søguna í Sosialinum, men gevur henni eina sexuta krúllu afturat: Tá Sjúrður sat á fólkatingi í 2008 og hevði farloyvi frá løgtinginum, fekk hann kortini fulla løn frá løgtinginum!

Dan vísir til lógina, sum sigur, at løgtingsmaður, sum tekur farloyvi orsaka av "fólkatingsørindum", varðveitir rættin til løn.

### Fullkomin mynd

Nú bleiv myndin líkasum fullkomin: Fyri tað fyrsta røkir Sjúrður Skaale ikki tað starv, hann er valdur til at røkja. Hann skulkar!

Fyri tað næsta mjólkar hann eisini pengar úr skipanini, uttan at rætta hond frá síðu! Dan Klein konkluderar elegant, at skulkarin er "av teimum stóru oportunistunum, og ein væl betaltur pampari".

Og so koyrir tað, sum tað skal: Mótstøðufólk hjá mær og mínum flokki verða ill. Tey, sum hava stuðlað mær, verða vónbrotin. - Og onkur smílist í skeggið, tí hann fær júst tað, sum hann vil hava...

Eg giti, at greinin eisini hevur samband við, at eg í míni nýggju bók sigi, at endamálið við skrivingini hjá Dan Klein hvørki er rættvísið ella sannleikin, men avdúkingin sjálv. Skandalan.

"Hatta skal Sjúrður hava ein uppá kjaftin fyri", hevur Dan helst hugsað.

Problemið er bara, at Dan staðfestir júst tað, sum eg sigi í bókini.

Endamálið er skandalan - og fyri at fáa skandaluna, offrar hann sannleikan.

### Sannleikin

Tí sannleikin um hasar pengarnar er hesin:

Tá eg í februar 2008 fekk til uppgávu at røkja fólkatingssessin fyri Tjóðveldi, segði eg beinanvegin løgtingssessin frá mær. Eg helt meg ikki til lítar kunna røkja bæði størvini í senn.

Løgtingsskrivstovan upplýsti tá fyri mær - júst sum Dan Klein skrivar - at eg varðveitti rættin til fulla tingmannaløn.

Men hevði Dan havt ringt til mín - ella til løgtingið - so hevði hann fingið at vita, at eg straks skrivaði til stjóran á løgtingsskrivstovuni, og bað hana um IKKI at flyta mær pengarnar.

Súsanna Danielsen, stjóri, svaraði soleiðis: "Í fólkatinginum kunnu limirnir ikki siga lønina frá sær, men hesa reglu hava vit ikki, so eg haldi hetta er í lagi."

Síðani varð lønarflytingin steðgað.

Altso: Eg hevði lógarkrav uppá pengarnar, men helt meg ikki hava moralskan rætt til teir, og tók tí ikki ímóti teimum. (Lønirnar umskaraðust kortini nakað tá eg tók við og tá eg gavst á fólkatingi.)

Hetta var ikki annað en rímiligt. Tað eru onnur enn eg, sum hava sagt nei takk til órímiligar, dupultar lønir, og eg havi aldrin ætlað at taka hetta gamla málið fram. Hinvegin haldi eg, at lógin eigur at verða broytt.

Má tá nú Dan Klein, grundað á lygnir, sigur at eg eri "ein av teimum stóru oportunistunum og ein væl betaltur pampari", so má eg vísa til fakta.

### Til endans

Til endans skal eg bara siga, at eg havi góða samvitsku. Eg havi ikki annað starv enn tingstarvið. Mín tíð fer til at røkja tað so væl, sum eg dugi. Tað skal eg eisini gera framyvir. Bæði tá eg siti í tingsalinum - og tá eg ikki siti har.

---

Sigfríður Olsen

## Má hava nýggja leiðslu

Seinasti hurluvasin í Føroya Javnaðarflokki er bert enn eitt dømi um, at tey, ið standa í fremstu røð í flokkinum, ikki ynskja ella eru ikki før fyri at leiða flokkin inn aftur á beint. Rúm tíð er liðin, síðan farið var undir at leita eftir javnaðarhugsjónunum og rótunum. Sigast má, at illa hevur gingist. Ístaðin fyri at taka í egnan barm, so verður nú alment lagt eftir einum persóni, sum um hesin er orsøkin til tær mongu "frustratiónirnar," flokkurin er komin sær í. Ótrúliga óheppið og vánaligt.

Løgið, at út av lagi vánaligu veljarakanningarnar og útsagnirnar frá trúgvum javnaðarstuðlum ikki rína við. Umberingar, so sum at flokkurin er í samgongu við tveir borgarligar flokkar, kunna ikki brúkast til nakað sum helst. Tí hvør hevur valt at vera í hesi samgongu? Óivað høvdu vit verið fleiri, ið høvdu stuðlað flokkinum í hesi samgongu, um vit sóu og merktu, at stríðst var bara fyri onkrum, ið bar brá av javnaðarhugsjónum. Men so er ikki, og tað er so væl skiljandi. Síðan núverandi formaður tók við, er einki mál komið í stevnuskránna, sum kann gera bata fyri tey, sum eru láglønt og tey, ið ikki klára dagligdagin. Og hvussu kundu vit væntað tað, tá mál sum stættarstríð og samhaldsfesti verða seld Fólkaflokkinum fyri at sleppa at vera stuðulsflokkur hjá hesum sama??

So komið ikki og sigið, at tit ikki duga at selja politikkin!!!

Tað er í tøkum tíma, at Javnaðarflokkurin fær nýggjan leiðslu.

---

Kitty May Ellefsen

## Frá hugskoti til handling

Eg má siga, at eg havi fingið sera nógvar positivar reaktiónir upp á skriv míni um, hvussu vit byrja við at fáa gongd á effektiviseringar og betringar av almennu tænastunum við at byrja á ovastu rókunum í almennu fyrisitingini.

Tað hava verið reaktiónir bæði frá vanligum borgarum, um man kann siga tað so, umframt frá fyrrverandi týðandi politikarum.

Hvussu koma vit so víðari.

Vit skulu, soleiðis sum tað liggur í kortunum, longu um tveir mánaðir verða samd um, hvussu vit minka um undirskotið á fíggjarlógini við einum 200-300 mió kr, skulu vit fáa javnvág á fíggjarlógini innan tíðarskeiðið samgongan hevur sett sær fyri.

Eg haldi, at vit skulu halda fast í, at vit byrja á ovastu rók, alt annað er ótrúverdugt og lítið virðiligt.

Vit eiga longu í verandi samgonguskeiði at minka ráðini niður í 6, og vit skulu leggja undirliggjandi stovnar saman og annars fáa teir at samstarva og samvirka fyri at fáa eina líka góða og effektiva tænastu. Er tað ein trupulleiki at landsstýrisfólk fara úr starvi, so kunnu tey í eini yvirgangstíð vera tvey í onkrum ráðum til eftir eitt val, tá talið av landsstýrisfólkum fara at passa betur til talið av aðalráðum.

Fara vit soleiðis til verka kunnu vit spara, effektivisera og flyta resssoursir til at taka hond um tey veiku í okkara samfelag og til annað mennandi virksemi.

Lat okkum fara í gongd nú, tí hvussu hvussu veljarar annars trúgva okkum.